# Bóndin hevur forbrotið seg

**Eftir eina klagu frá Sílaveiðufelagnum fann friðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu útav, at ein bóndi hevði grivið upp framvið áarbakkanum við Leynavatn. Hetta hevur hann ikki loyvi til sambært friðingarlógini, tí alt hetta økið er friðað. Nú hevur friðingarnevndin gjørt av, hvat skal henda í málinum**



*Bóndin, sum hevur grivið upp framvið áarbakkanum við Leynavatn, hevur nú fingið boð frá friðingarnevndini um at gera alt aftur, sum tað var áðrenn*
Mynd: Edvard Joensen

NÁTTÚRA
*Ingrid Bjarnastein*

Hann breyt friðingarlógina fram við Leynavatni, bóndin sum nakað herfyri gróv áarbakkan upp. Alt økið er friðað, men bóndin fór av sínum eintingum og gravaði fram við áarbakkanum har vatn stóð niðan í bøin. Hetta gjørdi hann fyri, at vatnið skuldi renna skjótari frá. Men í og við, at hann setti spakan í jørðina, breyt hann friðingarlógina, sum noktar slíkum. Alt økið er friðað, og málið varð kært til friðingarnevndina. Nú er nevndin komin til eina niðurstøðu

– Vit hava víst til grein trý og fýra í friðingarlógini, sum sigur, at greið forboð verða sett fyri allari tøku av gróti, sandi, mold, eyri og líknandi uttan loyvi frá myndugleikunum, sigur Ivan Klein Olsen, formaður í friðingarnevndini.

– Bóndin skal nú gera alt aftur, sum tað var áðrenn. Men avgerðin skal eisini fyrileggjast yvirfriðingarnevndini, sum skal góðkenna okkara úrskurð, og síðani hevur tann kærdi eisini eina kæringarfreist uppá fýra vikur.

Økið, sum bóndin hevur grivið upp, fevnir um einar 50 metrar, og har skal hann so leggja allar rúgvurnar hann hevur grivið upp í aftur.

**Ringt at fyribyrgja**

Ivan Klein Olsen heldur, at tað er ringt at fyribyrgja, at slíkt hendir aftur.

– Hetta er sum við koyring. Hvussu fyribyrgir tú, at fólk koyra ov skjótt? Upplýsing kanska. Upplýsa fólkum, sum ikki vita, hvat ein friðing inniber, hvat veruliga liggur aftanfyri. Men bøndur eiga at vita, hvat henda friðingin inniber, tað er vist.

– Sjálv friðingin er rímiliga umfatandi á hesum økinum, men hon bannar ikki nýtslu av økinum. Frávik kunnu gerast í samráð við friðingarmyndugleikarnar, men tá skal tú søkja um loyvi, sigur Ivan Klein Olsen.

– Men tað er ymiskt, hvussu man takklar friðingarlógina. Í hesum føri var tað ein klaga frá Sílaveiðufelagnum, har eg sum formaður fór inn og steðgaði arbeiðinum. Hartil krevja vit so, at hann skal gera alt aftur, soleiðis, sum tað var áðrenn hann gravaði alt upp.

## Tvær nýggjar fløgur frá Tutl







**Tutl hevur nú givið tvær fløgur út afturat**

TÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

Onnur fløgan er við Yggdrasil og Eivør Pálsdóttir. Tónleikurin er knýttur at Eivør, sum hevur sungið nýggj verk, og onnur verk, sum hava verið framførd instrumentalt. Øll verkini hevur Kristian Blak komponerað ella bygt upp av etniskum tilfari.

Yggdrasil hevur síðani 1981 framført og innspælt verk, ofta knýtt at aðrari list.

Afturat føroysku tónleikarunum Eivør Pálsdóttir og Brandur Jacobsen eru tónleikarar, sum hava teirra egna stíl. Serliga er tað Anders Jormin, sum er væl dámdur kring allan heim fyri sítt sermerkta bassspæl.

Hin fløgan er Spælimenninir – Flóð og fjøra. Hendan fløgan hevur 24 løg, sum eru frá Skandinavia.

# Slick til Íslands

TÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

Komandi fríggjadag fer pop/rock bólkurin, Slick, til Íslands. Har skulu teir spæla bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið á tí væl kendu Fjørðukránni í Hafnafirði.

Um tú hevur hug at uppliva nógv umrøddu Fjørðukránna, sum er gjørd í ektaðum víkingastíli, so hevur Atlansflog góð tilboð um vikuskiftisferðaseðlar, júst til hetta tiltakið.

Slick er mannaður við áhugaverdum tónleikarum, sum spæla í løtuni til dans ymsastaðni í landinum. Manningin sær soleiðis út: Sang og gittar, Hans Ravnsfjall, sum er kendur frá All That Rain, sang og bass, Jens Tummas Næss, sum eisini er kendur frá All That Rain, umframt Kjølar og Ikaroz, gittar og kór, Høgni Zachariassen, sum eisini hevur spælt við Ikaroz og Utopia, og aftanfyri



trummurnar situr Torkil Johannesen, sum eisini hevur verið við í Musketerunum, Plúmm og Chase.

Bólkurin hevur ein gestadj við á ferðini, og er tað Gissur Patursson, sum var nógv frammi í 70´unum og 80´unum, og nú hoyra vit hann í Sugguni í Útvarpi Føroya.

Myndatekstur Slick fer komandi fríggjadag til Íslands at spæla á Fjørðukránni



